*Dagf. 3. mai 2021*
*HMR J. nr. 21/06802-3*

***Kaj Leo Holm Johannesen***
***landsstýrismaður***

***Svar***

***upp á***

**Fyrispurning nr. 52-130/2020 eftir § 52a í tingskipanini um koppseting av útisetum, frá Beinir Johannesen, løgtingsmanni**

**Fyrispurningurin er soljóðandi**:

1. Hava føroyingar, ið eru búsitandi uttanlands, men í løtuni staddir í Føroyum, møguleika at bíleggja tíð til koppseting í Føroyum?
2. Um ikki, hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera hetta møguligt?

**Til spurning 1:**
Í kunngerðini um ókeypis koppseting ímóti COVID-19 er ásett, at «Tilboð um ókeypis koppseting ímóti COVID-19 verður veitt persónum, fevndir av hesari kunngerð, ið eru búsitandi í Føroyum.» Ásetingin merkir, at føroyingar, ið eru búsitandi uttanlands, ikki kunnu verða koppsettir fyri COVID-19, meðan teir eru í Føroyum. Hetta er sama skipan, sum er galdandi fyri øll onnur tilboð um ókeypis koppsetingar í Føroyum.

Sambært Studna eru 1.039 føroyingar undir útbúgving uttanlands. Av hesum eru 882 undir útbúgving í Danmark; meðan 157 eru undir útbúgving í øðrum londum t.d. Avstralia, Kina, Póllandi og Onglandi.

Sum nú er, eru bæði teir útisetar og føroyingar annars, sum hava valt at koma til Føroyar, og teir, sum framvegis eru staddir uttanlands í eini grásonu:

- Teir føroyingar, sum eru komnir til Føroyar, kunnu ikki verða koppsettir í Føroyum; og tað er tvørligt og kostnaðarmikið hjá teimum at fara til landið, har tey búgva ella eru undir útbúgving, at koppseta seg
- Teir føroyingar, sum framvegis eru uttanlands í sambandi við útbúgvingina koma eisini í eina tvístøðu, orskað av ásetingini í kunngerðini. Um tey ikki eru koppsett, ella ikki liðugt koppsett í tí landinum, sum tey búgva í, kann tað vera, at tey ikki kunnu koma heim til Føroyar í summarfrí, tí tey ikki eru liðugt koppsett.

.

**Til spurning 2:**
Eg haldi, at tað er sera týdningarmikið, at føroyingar, sum eru staddir fyribils í Føroyum, eisini verða fevndir av tilboðum um COVID-19 koppseting. Hjá útlendingum, sum halda til í Føroyum í longri tíðarskeið, til dømis í arbeiðsørindum, er tað somuleiðis bæði tvørligt og dýrt, verða teir noyddir at fara til heimlandið – helst tvær ferðir – fyri at lata seg koppseta fyri COVID-19.

Av tí, at støðan viðvíkjandi COVID-19 er so serstøk, er tað skilagott at gera eitt undantak frá meginregluni um, at tilboð um koppseting bert verður veitt persónum, ið eru búsitandi í Føroyum. Við støði í hesum, eri eg tí farin undir arbeiðið at víðka COVID-19 koppsetingarkunngerðina, so hon eisini fevnir um útisetar og útlendingar, sum eru í Føroyum í longri tíð. Bæði útisetar og útlendingar verða koppsettir, tá bólkarnir, teir annars høvdu hoyrt til, um teir búðu her, standa fyri tørni. Talan verður sostatt ikki um at gera nakra serskipan fyri hesar báðar bólkarnar.

Eg ætli, at tað verður ásett í kunngerðini, at tilboðið um ókeypis koppseting fyri COVID-19 verður víðkað til persónar, ið uppihalda sær í Føroyum fyribils í eitt longri tíðarskeið (t.v.s. í minsta lagi í 30 dagar). Við hesum kravi verður forðað fyri, at víðkaða kunngerðin letur upp fyri koppsetingarturismu – tað er, at fólk bara koma til Føroya við tí endamáli at fáa eina skjóta og ókeypis koppseting.

Heilsumálaráðið, 3. mai 2021

**Kaj Leo Holm Johannesen**
landsstýrismaður